# »Hentari er handartak manni



*Jóhan Hendrik Winther Poulsen blaðar í fyrsta eintakinum av »Orðabókini« á hátíðarhaldi á Føroya Læraraskúla leygardagin. Høllin var stúgvandi full av fólki, sum komin vóru at heiðra »Orðabókini«*
Mynd: Eirikur Lindenskov

*Góði Jóhan Hendrik! Góða samkoma!*

Fyri skjótt fjøruti árum síðan, hin 1. oktober 1969, var Jóhan Hendrik inni í útvarpinum niðri á Bryggjubakka, har ið útvarpsstjórin Niels Juel Arge hevði samrøðu við hann í útvarpstáttinum *Millum fjals og fjøru*. Við hesi samrøðu varð sjøtul settur á tann so vælkenda útvarpstáttin *Orðabókina*, ið Niels Juel Arge skeyt upp at nevna hann. Fyrimyndin fyri útvarpstáttinum *Orðabókini* var tátturin *Íslenzkt mál*, ið Jakob Benediktsson og samstarvsmenn við Orðabók Háskóla Íslands stóðu fyri. Tá ið Jóhan Hendrik las í Íslandi árini 1960-62, var, sambært honum sjálvum, hesin táttur millum tað útvarpsevni, ið honum dámdi eina best at lýða á. Tá ið hann í 1968 varð settur til at greiða til útgávu eykabind til føroysku-donsku orðabókina og farið varð ígjøgnum orðasavnið, gjørdist tað honum skjótt greitt, at tørvur var á at fáa svarað ótaldum spurningum um orð í savninum, skuldi tað vera møguligt at geva fullgóða lýsing av merking, nýtslu, framburði, útbreiðslu o.s.fr. Tá vóru hyggjuráðini at taka til tað, sum hann hevði lært av íslendskum orðabókarmonnum: at nýta útvarp til at koma í samband við fólk við spurningum um orð, ið ov lítið var vitað um. Og hvar er sjálvsagdari at leita eftir málinum enn hjá tí fólki, sum talar tað, og ígjøgnum útvarpið bar jú til at koma út í hvønn krók í landinum.

Í hesi samrøðuni 1. oktober 1969 – úrdráttur er prentaður sum inngangsorð í bókini – varð m.a. sagt frá ætlanini við táttinum. Boðið varð fólki at senda honum spurningar um málslig ivamál, og afturfyri skuldi so Orðabókin kunna spyrja lurtarar um orð og orðafelli, sum savninum skortaði upplýsingar um. Longu í hesi samrøðu vórðu tveir spurningar settir lurtarum. 23. oktober varð fyrsta Orðabókarsendingin útvarpað. Sagt varð eina ferð aftur frá endamálinum við táttinum. Eitt málsligt evni varð tikið til viðgerðar, eins og gjørt varð í flestum eftirfylgjandi sendingum, og at enda vórðu tveir spurningar settir lurtarum; tað var eisini reglan í øllum sendingum aftaná. Tað varð honum spáað av summum, at henda roynd fór ikki at geva úrslit, tí at ilt mundi vera at fáa fólk at skriva brøv. Jóhan Hendrik var eisini heldur vónsvikin av úrtøkuni av fyrstu sending, tí at bert eittans bræv kom. Tað var ein fyrispurningur um eitt orð; einki svar kom til teir spurningar, hann hevði sett. Men nú var ikki at gevast á hendur og falla í fátt, og aftan á aðru sending, ið var 6. november, var annað lag: tað komu ikki færri enn 15 brøv. Síðan var *Orðabókin* regluliga at hoyra í útvarpinum 14. hvønn dag vetrarhálvuna, men lá tó niðri einstakar vetrar. Síðsta sending, sum var nr. 198 í røðini, varð send 26. apríl 1993. Hvør sending var um hálvan tíma til longdar.

Undirtøka lurtaranna var frálíka góð, nógv betri enn vónað og væntað var. Orðasavnið hevur á henda hátt fingið nógv orðatilfar, ið annars valla var komið, og nýggjar upplýsingar um orð, tað hevði ov lítla vitan um. Mong sendu orð og orðafelli av sínum eintingum, ja, frá summum komu heil orðasøvn. Eisini fekst ikki sørt burtur úr málburðinum í brøvunum sjálvum. Tað, sum sermerkir flestøll brøvini frá lurtarunum, er, hvussu væl, ið greitt er frá orðunum, og hvussu greið, ið dømini eru, og hvussu greidligt tað samanheingið er, ið orðini verða sett í. Nógvar av hesum orðingunum kundu vit beinleiðis nýta í okkara orðalýsingum til móðurmálsorðabókina, sum kom í 1998. 15. oktober 1976 varð sending nr. 70 send. Tá nevndi Jóhan Hendrik nøkur tøl frá eini uppgerð, ið hann hevði gjørt. Til tær 69 ferðirnar, ið *Orðabókin* hevði verið í útvarpinum, fekk hon til samans tætt við 700 brøv, t.e. um 10 í miðal til hvørja sending, og um leið 4500 orð vóru skrivað á seðlar til orðasavnið, t.e. um 65 í miðal frá hvørjari sending. Ávísir lurtarar sýndu eisini táttinum serstakan trúskap og skrivaðu ferð eftir ferð. Brøv vóru komin frá um 340 ymsum fólkum í 69 bygdum og býum, og harafturat komu ikki so fáir brævskrivarar, ið ikki nevndu seg við navni. Jóhan Hendrik hevði sum meginreglu ikki at nevna nøvn teirra, ið skrivaðu brøv, ikki minst tí, at tað vóru so mong, sum bóðu um

## Orðabókin sjeytifimm

FØÐINGARDAGUR

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Leygardagin var stórt hátíðarhald í høllini á Føroya Læraraskúla í sambandi við, at Orðabókin kom út, og at maðurin við sama eyknevni, Jóhan Hendrik Winther Poulsen, fylti 75 ár.

Bókin er eitt heiðursrit í sambandi við føðingardagin. Í bókini eru allar tær 198 orðabókasendingarnar, sum Jóhan Hendrik Winther Poulsen hevði í útvarpinum árini frá 1969-1993.

Tað er Anfinnur Johansen, lektari á Føroyamálsdeildini, sum hevur lagt »Orðabókina« til rættis, og tað var eisini hann, sum handaði honum fyrsta eintakið av bókini.

Fleiri røður vórðu hildnar. Fyrstur var Jonhard Mikkelsen, stjóri í Sprotanum, sum hevur givið bókina út. Hinir røðararnir vóru Anfinnur Johansen, Turið Sigurðardóttir, Hanus Kamban, Árni Dahl, Martin Næs og Signar á Brúnni.

Kór við Ólavi Hátún sang nakrar sangir. Síðani høvdu fólk høvi at ogna sær bókina og fáa hana signeraða av Jóhan Hendriki Winther Poulsen.

Vit prenta í dag røðuna, sum Anfinnur Johansen helt.